Nógv kemur burturúr einum vetri á Kvøldskúlanum. – Frá framsýningini seinasta ár

Kvøld- og Ungdómsskúlin:

Skúlin fyri øll

Umframt tað, sum er at síggja á stóru framsýningini í Eystursskúlanum, fer nógv annað fram í Kvøld- og Ungdómsskúlanum. – Serliga í hesum tíðum nú arbeiðsloysið er vaksandi, virkar skúlin sum eitt trygdarnet. Øll kunnu ganga her, ung og gomul, brekað og røsk. Øll, sum ikki høvdu nóg nógva skúlagongd ella ikki nóg góð úrslit til at útbúgva seg víðari, kunnu betra møguleikarnar her

Leygardagin 16. mars og sunnudagin 17. mars hevur Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli framsýning í Eystursskúlanum frá klokkan 14 til 19. – Leygardagin er eisini framsýning í Kalbaks Skúla.

Á framsýningini verður ymiskt handaligt arbeiði, sum Kvøldskúlanæmingarnir hava gjørt í vetur, víst fram:

Smíð, seyming, vevnaður, silkimáling, ull og steinarbeiði, tekning, máling, leirarbeiði, fotolæra, postalínsmáling, grafikk, bókbinding, elektronik o.s.fr.

Í sambandi við, at Tórshavnar Kommuna fyllir 125 ár, verður eisini ymiskur tónleikur og sangur á framsýningini.

Nógvar lærugreinir

Umframt tær handaligu greinirnar, sum síggjast aftur á hesi framsýningini, hevur Kvøldskúlin nógvar aðrar lærugreinir, umleið 133 í tali. Millum hesar lærugreinir eru t.d. bókhald, maskinskriving, enskt, týskt, føroyskt, franskt, spanskt, datalæra, íslendskt, latín, teknmál, søga o.a.m.

26 flokkar ganga til royndarfyrireikandi lesnað, tað merkir, at 17 flokkar ganga í 9. og 10. flokki, meðan 9 flokkar fyrireika HF.

Skúlin endar 28. juni, men eini 3 flokkar koma at ganga í skúla í summarfrítíðini.

Nógvir næmingar fáa serundirvísing – 70 flokkar.

Tað kunnu vera ymiskar grundir til, at fólk fáa serundirvísing. – Nøkur av hesum fólkum koma síðani so líðandi inn í teir vanligu flokkarnar, og eisini nøkur av teimum taka prógv.

Játtanin minkað við 50%

Tað er Tórshavnar Kommuna, sum eigur Kvøld- og Ungdómsskúlan, og hann verður rikin eftir frítíðarlógini.

Hetta má sigast at vera ein góð lóg, tí hervið fáa øll yvir 14 ár møguleika at fara í skúla, uttan mun til nakað sum helst.

Skúlin virkar sum eitt trygdarnet undir øllum. – Vit vita øll, at arbeiðsloysið er vaksandi – serliga í millum ung fólk. Tí er tað kanska ógvuliga óheppið fyri tey ungu, at sparingarnar hava rakt henda skúlan so meint.

Fíggjarjáttanin er minkað við umleið 50%.

Virksemið minkað

Eingir pengar eru avsettir til frítíðarvirksemi fyri børn og ung, so hesum verður einki av. – Tað er bara synd, at ein so spennandi og vælgerandi møguleiki fer fyri skeyti.

Í ár hava umleið 2.500 næmingar gingið á Kvøldskúlanum. Hetta er munandi minni enn árini frammanundan. – Í nógv ár hava umleið 4.000 næmingar gingið í Kvøldskúlanum.

Av tí, at fíggjarligi niðurskurðurin er so stórur, verður eisini neyðugt at minka virksemið hjá skúlanum heilt nógv komandi skúlaár.

Málrættaðir og áhugaðir næmingar

Hesin skúlin er sum sagt fyri øll: ung og gomul, brekað og røsk.

Men hvørji eru t.d. teir 261 næmingarnir, sum ganga í 9. og 10. flokki.

Hetta eru næmingar, sum eru farnir tíðliga úr skúlanum úr 7. 8. ella 9. flokki, ella tey hava ein ella fleiri vánaligar karakterir. – Tað kunnu eisini vera næmingar, har prógvið er ov gamalt til at sleppa inn á ein ávísan skúla ella læruplass.

Nógvir næmingar vilja fegnir aftur í skúla t.d. á HF, studentaskúla, maskinskúla, sjómansskúla, sjúkrasystraskúla o.s.fr.

Tað hevur eisini víst seg, at næmingarnir á Kvøldskúlanum fáa sera góð úrslit. – Hetta er ivaleyst lætt at skilja, tí hesir næmingar ganga í skúla við einum ávísum máli og harvið eisini við størri áhuga.

Til gagn og gleði fyri nógv

Tey, sum ganga í 9. 10. flokkum og á HF, eru fólk sum arbeiða um dagin og so velja henda skúlamøguleikan.

Næmingarnir gjalda fyri at ganga á Kvøldskúlanum 400 krónur og 4 krónur fyri hvønn tíman. – Alt tilfarið, tey brúka, gjalda tey fyri sjálvi.

Napoleon Nólsoy, leiðari á Kvøldskúlanum sigur, at Býráðið og Landsskúlafyrisitingin hava verið sera positiv fyri hesum skúlanum, tí hevur hann havt so góðar møguleikar, sum ein hópur av fólki hevur havt stóra gleði og stórt gagn av. – Og tí mugu vit siga, at tað var spell, at kreppan bleiv so stór.

S

Danska fyritøkan Vestas:

Sett 25 vindmyllur upp í Jútlandi

Hesar vindmyllur eru av sama slag, sum Vestas bjóðaði sær at seta upp í Føroyum í fjør, og hetta gerst møguliga veruleiki í ár

Í gjár vórðu 25 vindmyllur, sum danska fyritøkan Vestas hevur gjørt, tiknar í nýtslu. Vindmyllurnar eru settar upp í Thy í Norður Jútlandi og eru av sama slag, sum Vestas hevur boðið sær at sett upp í Føroyum.

Talan er um 225 kWh vindmyllurnar hjá fyritøkuni. Hesar 25 vindmyllurnar skuldu givið 17 mió. kWh tímar um árið.

Vestas var í Føroyum í fjør, og bjóðaði sær at seta 10 vindmyllur upp í Føroyum, og ætlanin er, at tað í ár skal gerast veruleiki at fáa vindmyllur upp í Føroyum.

Vestas hevur givið fleiri kommunum tilboð um at seta myllir upp, og fleiri kommunur hava víst hesum ætlanum áhuga. Kommunur og fyritøkur skulu einans gjalda fyri el-kostnaðin, sum verður mettur at vera helvtina minni enn núverandi el-prísur. Vestas hevur boðið sær at seta myllurnar upp og hava alla ábyrgdina av teimum, umframt at gjalda kostnaðin at seta tær upp.

Óli Gordon Bech, umboðsmaður hjá Vestas í Føroyum, sigur, at landsstýrið ikki vil seta seg upp ímóti, at vindmyllurnar verða settar upp. Tað einasta sum manglar er at fáa orkuna budna í el-netið, og tað er hetta sum Vestas nú fer at tosa við landsstýrið um.

klh

Avsláttur á endurbílegging!

Bilegg nøkur góð minnir ...
nú við avsláttri.

Tilboðið er galdandi til 27.03.91

Vit framkalla myndir tínar hjá Kodak

Kodalux
LITMYNDIR

Endurbíleggingarprísur 10 x 15 cm
eftir litnegativum, fyri hvørt
BERT
Vanl. prísur kr. 4,95
2,95

SMS FOTO
Tlf. 19820

1971 **20 ÁR** 1991

SERTILBOÐ

Eisini fara vit at bjóða ein hóp av góðum tilboðum uppá:
NÝGGJAR BILAR ☆ EYKALUTIR ☆ TILHOYR ☆ RUSTVIÐGERÐ ☆ STARTARAR ☆ GENERATORAR
o.a. Hetta fara tygum at frætta meir um, í komandi lýsingum.

40 YMISKIR BRÚKTIR BILAR VIÐ AVSLÁTTRI UPP TIL 20.000,- kr.

Leygardagin 16. mars er opið frá kl. 10.00-14.00

IJ bilar

IVAN JOHANSEN
Hoyviksvegur, Box 205, 110 Tórshavn, Tlf. 13666